Fróðskaparsetur Føroya

# KT-frøðingur á Náttúruvísindadeildini

Treytað av játtan er eitt undirvísingar- og granskingarstarv í kunningartøkni (KT) leyst at søkja á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya við setan frá 1. mai 2000 ella skjótast gjørligt. Talan kann verða um fyribilssetan fyrstu mánaðirnar. Starvið er liður í uppbygging av fakligum førleika í kunningartøkni á Náttúruvísindadeilini.

**Gransking**
Tann, ið settur verður í starvið, kemur at inna gransking og at virka fyri fakligari menning innan kunningartøkni, heruppií at hava formligt samskifti við granskingar- og vinnuumhvørvið á KT-økinum. Granskingarvirksemið verður í stóran mun at laga eftir tí serkunnleika, ið viðkomandi hevur.

**Undirvísing**
Í høvuðsheitum er undirvísingarparturin í starvinum at fyrireika og samskipa virksemið í nýggju BS-útbúgvingini í kunningartøkni, umframt at undirvísa í pørtum av henni. Viðkomandi skal eisini kunna luttaka í øðrum undirvísingar- og fyrisitingarvirksemi á Náttúruvísindadeildini.

**Førleikakrav**
Umsøkjarar mugu í minsta lagi vera cand. polyt., cand. scient. ella hava tilsvarandi útbúgving við denti á kunningartøkni. Umsøkjarar við hollum fakligum royndum innan kunningartøkni hava fyrimun.

**Metingarnevnd**
Sett verður ein metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at hvør umsøkjari fær sendandi raðfestingina av umsøkjarunum og metingina um egnan førleika.

**Umsóknir**
Umsóknir við ævilýsing (curriculum vitae), avritum av próvskjølum, viðmælum ella tilvísingum, serprentum og avritum av vísindaligum ritgerðum (í 4 eintøkum) mugu vera Setursskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 26. apríl 2000.

**Lønar- og starvsviðurskifti**
Løn, flokking (adjunkt/lektari) og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Setursskrivstovan
Handan Á 5
100 Tórshavn

## Almennur fundur

í gamla prestagarði á Nesi hóskvøldið 6. apríl kl. 19.30.

Karin Kjølbro heldur fyrilestur um arbeiðsloysi millum kvinnur undir heitinum »Kvinnur, ið fáa útgjald frá ALS«. Øll eru vælkomin.

**Tofta Kvinnufelag**

Hagstova Føroya

# Fulltrúi til hagtalsuppgerðir

**Starvsinnihaldið**
Í høvuðsheitum er uppgávan at arbeiða við vinnuligum og øðrum búskaparligum hagtølum, sum liggja til grund undir ymsum uppgerðum.

Eitt nú til uppgerð av tjóðarroknskapi gera vit sonevndar deildarroknskapir fyri allar privatar vinnur, kommunurnar sum heild, landskassan og donsku statspartarnar í Føroyum. Starvið verður serliga at vera við í arbeiðinum við hesum deildarroknskapum, men kann sakt-ans umfata aðrar hagtalsuppgerðir í sambandi við búskapin annars.

**Persónurin og útbúgvingin**
Brúk er tí fyri einum fólki við góðum innliti í roknskaparviðurskifti og skili fyri samfelagsbúskapi, sum dugir at arbeiða við mest vanligu teldufoiritum og sum ikki óttast at fara í holt við forriting. Tað er ein fyrimunur at kenna eitt sindur til forriting í SQL ella øðrum forritingarmáli, men ikki eitt krav kortini.

Hóast tað krevst at tú sjálvstøðugt ert førur fyri at loysa uppgávurnar tú fert at sita við, fert tú at hava tætt samstarv við aðrar búskaparfrøðingar, teldufyrisiting og skrivstovufólk á stovninum.

Til starvið krevst útbúgving sum cand.polit., cand.oecon., cand.merc. ella bachelor útbúgving í búskaparligum/fíggjarligum lærugreinum.

**Arbeiðsplássið**
Hagstovan er fyrst og fremst eitt víttfevnandi stað, har ið tú fært innlit í avgerandi og aktuell samfelagslig viðurskifti, tí umframt at lýsa samfelagið í regluligum uppgerðum, eru vit eisini við í lýsingini av øðrum aktuellum viðurskiftum, sum stinga seg upp. Alt sum vit framleiða av vitan og upplýsing er til at kunna borgararnar um, so at ein partur av flestu uppgávum er at hava samskifti við onnur.

**Løn og treytir annars**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

**Umsóknarfreist og annað**
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15.apríl.

Nærri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Hermann Oskarsson, stjóra, á telefon 352028 ella í telduposti hermann@hagstova.fo.

## Reyði krossur Føroya

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. 17[00] til 23[00]

☎ 212380

Hagstova Føroya

# Heimasíðufyrisitari og NT-stuðul

**Starvsinnihaldið**
Starvið er fyri mesta partin at skipa fyri samskiftinum hjá Hagstovuni við umheimin um internetið og at vera NT-stuðul hjá hinum starvsfólkunum. Alt meira av teimum hagtølum og uppgerðum, sum vit á Hagstovuni framleiða, fara um internetið til brúkaran, og í tí sambandi hava vit brúk fyri einum fólki til at menna henda partin av upplýsingarvirkseminum.

Av tí at arbeiðið fyri stóran part annars fer fram í Oracle umhvørvi, er kunnleiki til Oracleskipanir og SQL forriting ein fyrimunur, tó ikki krav.

Hóast starvið í høvuðsheitum hevur við internetsambandið at gera, so kann roknast við at ein partur av arbeiðinum verður at luttaka í ymsum hagtalsuppgerðum.

**Persónurin og útbúgvingin**
Fólkið okkum tørvar skal hava hug til teldu-arbeiði sum heild, men haraftrat við evnunum at koma við hugskotum og at arbeiða sjálvstøðugt við heimasíðu og øðrum telduloysnum. Í hesum sambandi er eisini neyðugt at hava evnini at vera í tøttum samstarvi við aðrar telduumsitarar og fólkini, sum fáast við hagtalsuppgerðir.

Útbúgving innan teldufakið er ynskilig, men fólk sum hevur fingið sær førleikan á annan hátt ella hevur royndir úr øðrum starvi er eisini vælkomin at søkja starvið.

**Arbeiðsplássið**
Hagstovan er fyrst og fremst eitt víttfevnandi stað, har ið tú fært innlit í avgerandi og aktuell samfelagslig viðurskifti, tí umframt at lýsa samfelagið í regluligum uppgerðum, eru vit eisini við í lýsingini av øðrum aktuellum viðurskiftum, sum stinga seg upp. Alt sum vit framleiða av vitan og upplýsing er til at kunna borgararnar um, so at ein partur av flestu uppgávum er at hava samskifti við onnur.

**Løn og treytir annars**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag

**Umsóknarfreist og annað**
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10.apríl.

Nærri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Hermann Oskarsson, stjóra, á telefon 352028 ella í telduposti hermann@hagstova.fo.

## Norðstreymoyar Handverkarafelag

Ársaðalfundur verður í Kollafirði mánadagin tann 17. apríl. Tíð og stað verður lýst seinni.

**Nevndin**



# Tímalærarar til Fiskivinnuskúlan

Søkt verður eftir tímalærarum í

**Aling (2 t/v),**
**Samfelagsfrøði á C-stigi (3 t/v)**
**Smáverulívfrøði á B-stigi (4 t/v) og**
**Virkisbúskapi á B-stigi (6 t/v)**

at byrja á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna 1. august 2000.

Umsøkjarar skulu hava prógv frá lærdum háskúla e.l., sum gevur førleika at undirvísa í lærugreinunum. Umsøkjarar við vinnuroyndum hava fyrimun.

Tímarnir verða løntir samsvarandi tímalærarum á studentaskúla- og HF-skeiðunum.

Umsókn skal skrivast á serligt umsóknarblað, sum fæst á Fiskivinnuskúlanum ella á Undirvísingar- og mentamálastýrinum. Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran á Fiskivinnuskúlanum.

Umsóknir við ljósprentum av próvskjølum o.ø. skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 14. apríl 2000.



**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96
350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73
Teldupostur:
fiskvest@fiskvest.fo

## Lastbilamekanikari

Til verkstað okkara, søkja vit eftir einum lastbilamekanikara, at byrja skjótast tilber.

Áhugaði kunnu seta seg í samband við okkum á tel. 44 72 00

Sp/f OCD

OCD

Heiðavegur
FO-600 Saltangará
Tel. 44 72 00 Fax 44 74 64

Sosialurin - 311820

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

Føroya Postfelag

# Farloyvisstarv

**Søkt verður eftir skrivara í hálvtíðarstarv í tíðarskeiðnum 15. mai 2000 - 15. mai 2001, tá skrivari felagsins fer í farloyvi.**

**Skrivarin skal taka sær av allari fyrisitingini hjá felagnum**
- vera skrivari á fundum, undir samráðingum o.ø.
- hava alla umsitingina av felagnum og húsum felagsins
- alt brævaskifti felagsins
- roknskap felagsins

**Krøv til umsøkjara**
- góðan føroyskan málkunnleika
- góðan teldukunnleika
- roknskaparkøn/ur – helst hava kunnleika til concorde roknskaparskipanina
- neyðugt er at vera røkin og at kunna arbeiða sjálvstøðugt
- at hava yvirlit yvir alt virksemi felagsins

Neyðugt er, at viðkomandi er skrivari á kvøldfundum, samráðingarfundum o.ø. fundum.

Starvið verður lønt sambært avtalu.

Meira fæst at vita um felagið á heimasíðu okkara: www.postfelag.fo

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til felagið millum kl. 9.00-12.00.

Umsóknin skal vera felagnum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 17. apríl** og sendast til:

**Føroya Postfelag**
Tinghúsvegur 15
Tórshavn
tlf. 317231
teldupostur: postfelag@postfelag.fo

## Frá Norðoya Javnaðarfelag

Aðalfundur verður í Bøgøtu nr. 3 mikukvøldið 5. apríl kl. 19.30.

Skrá: sambært lógina.

**Norðoya Javnaðarfelag**

## Frá Havnar Handverkarafelag

Útsetti ársaðalfundur felagsins verður á Hotel Hafnia mikudagin hin 5. apríl kl. 19.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

www.handverkarafelag.fo

## NORÐURLANDAHÚSIÐ

# Tiltøk í apríl 2000

**Fríggjadagin 07.**
»Vinnudagur 2000«. Føroya Arbeiðsgevarafelag skipar fyri. Á skránni eru fyrilestrar og kjósanin av »ársins virki«. Tilmelding til Vinnuhúsið seinast 27. mars **kl. 10.00-18.00**

**Leygardagin 08.**
Fundur hjá Føroya Grindamannafelag **kl. 12.00-18.00**

**Leygardagin 15.**
**Í Christianskirkjuni í Klaksvík.**
Danin, Niels Vigild spælir einmanssjónleikin »Markus Evangeliið« **kl. 15.00**

**Sunnudagin 16.**
Danin, Niels Vigild spælir einmanssjónleikin »Markus Evangeliið« **kl. 16.00**

**Mánadagin 17.**
**Í Húsavíkar kirkju**
Danin, Niels Vigild spælir einmanssjónleikin »Markus Evangeliið« **kl. 20.00**

**Um páskirnar: Húsið er stongt frá hósd. 20. apríl til og við 2. páskadag 24. apríl.**

**Flaggdagin 25. apríl: Húsið er opið sum sunnudag, frá kl. 14.00 til 18.00.**

**Fríggjadagin 28.**
Sølustevnan »TórNuuRek 2000« letur upp. Føroyskt, grønlendskt og íslendskt handilslív møtast og sýna fram **kl. 13.00-16.30**

**Leygardagin 29.**
Sølustevnan »TórNuuRek 2000«. Alment. Føroyskt grønlendskt og íslendskt handilslív møtast og sýna fram **kl. 10.00-16.30**

**Norðurlandahúsið inkl. kaffistovan hevur opið yrkadagar kl. 10-18 sunnudagar kl. 14-18.**

**Broytingar kunnu koma fyri. Hoyrið tí ÚF-lýsingar og sí skránna á tekstvarpi í SVF frá s. 650**

**Norðurlandahúsið í Føroyum**
**Telefon 317900 • Fax 319790**
**E-mail: nlh@nlh.fo**
**http://www.nlh.fo**

## Sethús í Sørvági til sølu

Smærri eldri sethús í Sørvági til sølu. Húsið er samanbygt við annað hús. Nærri upplýsingar við at venda sær til undirritaða Ólavur Jákup Kristoffersen, adv., Fr. Petersensgøta 9, 100 Tórshavn, tlf. 311145.

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**